Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Magnus Rasmussen, landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum

Evni: Matvørutrygd

Spurningar:

1. Hvat verður gjørt við matvørutrygd í Føroyum, nú kríggj er í Ukraina, og matvøruprísir hækka?
2. Hvat samskifti hevur verið millum landsstýrið og føroyska landbúnaðin fyri at tryggja nóg mikið av matvøru í Føroyum?
3. Hvørjar ætlanir eru um at menna føroyska landbúnaðin, so bøndur kunnu fara at framleiða uppaftur fleiri matvørur til føroyska marknaðin?

Viðmerkingar:
Í Evropa er vanligt, at ES ger nógv fyri at tryggja matvørur til borgarar í ES londum, og at tað tí eru matvørur, sum t.d. mjøl á goymslu.
Nógv av matinum, sum føroyingar eta, eru innfluttar vørur. Vit sóu, tá korona tók seg upp, at fólk byrjaðu at leggja mat inn undir seg, tí fólk stúrdu fyri, at ikki nóg mikið av mati fór at koma til landið.
Nú kríggj er í Ukraina, eru matvøruprísirnir farnir nógv upp, og hugsandi er, at trupult verður at fáa fatur á ávísum vørum.
Vit síggja eisini, tá ódnarveður hevur verið, og skip eru seinkað, at handilshillarnar eru tómar.
Í Føroyum eru vit heppin at hava nógva fiskavøru, og eisini verður meira og meira framleitt av landbúnaðarvørum.
Hesar vørur hava eisini stóran týdning fyri møguleikan fyri, at Føroyar kunnu vera sjálvbjargnar við matvørum, sum jú er rættiliga umráðandi, tá kreppustøður taka seg upp.
Fyri at fáa greiðu á málinum verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 5. apríl 2022

Beinta Løwe Jacobsen